miðvikan
Nr. 125 • 02. juli 2008
Siðsøguligt tilfar
í Sosialinum mikudagar

# Grannalagið hjá Tróndi í Gøtu

**Í samband við Tróndardagarnar í Gøtu skal her verða gjørd ein roynd at lýsa gomlu Norðragøtu fyri umleið 100 árum síðani. Henda lýsing er grundað á tað yvirlit yvir bygdina sum Arnleyg Jacobsen, legendariski formaðurin í Gøtu Fornminnisfelag, gjørdi í síni tíð. Hon skal eisini verða grundað á ta myndina av kirkjufólki, sum varð tikin í 1911**



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

Í hesi røð verða frásagnir frá húsunum í grannalagnum, har hildið verður, at Tróndur búði.

Her verður í fyrsta umfari talan um Blásastovu, og hava vit frásøgn frá Tórir Thomsen, sum er ættaður úr húsinum. Men stórt sæð var øll bygdin eitt grannalag, tí húsini vóru trunkað saman.

Eisini verður greitt frá báts- og skipavanlukkum í Gøtu, har Arnleyg Jacobsen eisini er ein kelda.

Fyrst skal tó lýsast gongdin í húsa- og fólkatali í Norðragøtu frá fólkateljingina í 1801 til 1911.

Í 1801 vóru 16 hús við 68 fólkum í Norðragøtu. Í 1834 vóru framvegis 16 hús, men nú við 106 fólkum. Fram til 1860 vóru 19 hús, og var fólkatalið tá komið upp á 118. Fólka- og húsatalið øktist síðan so líðandi, til tað í 1911 vóru 174 fólk í 31 húsum.

Í Syðrugøtu vóru í 1911 33 hús, og fólkatalið var 185. Tískil vóru bygdirnar nakað líka til støddar.



*Funnings Jógvan*

Við Gøtugjógv vóru seks hús við 48 fólkum. Undir Gøtueiði var eitt hús við níggju fólkum. Tað vóru tískil tá um 400 fólk í sóknini, meðan tey nú eru um 1.100.

## Blásastova

Eini tey mest kendu húsini í gomlu bygdini í Norðragøtu er Blásastova. Pápi Tórir Thomsen, Peter Jakku, var ættaður úr Bláma-stovu, og tí kom Tórir ofta inn higar. Tórir hevur greitt okkum frá húsinum og teimum fólkum, sum hava búleikast har.

Blásastova er bóndahús í tveimum pørtum. Niðari partur er bygdur í 1835 og tann ovari í 1860. Tá búðu tvær bóndafamiljur inni, nevniliga langomma og langabbi og olduromma og oldur-abbi. Nýggjari parturin var bygdur til tey eldru hjúnini. Tey kundu flyta inn hagar, so tey yngru hjúnini kundu fáa gomlu og størri húsini fyri seg sjálvi.

Húsini eru rættiliga rúmlig og bærilig eftir tátíðar viðurskiftum. Í niðara parti er roykstova, ikki við fýrstaði, grúgvu ella moldgólvi, sum siður var um hetta mundi, men við trægólvi og komfýri, sum vanligt varð seinni. Í roykstovuni er brík, torvkassi, beinkir og tvær koyggjur.

Umframt roykstovuna er ein køkur, róptur niðri í køk, við fýrstaði, brík og trappum upp á loftið. Ein rúmligur kovi er í samband við køkin. Eitt kamar er við himmalsong, skápi og bíleggarovni, sum lagt verður í úr komfýrinum í roykstovuni. Í niðara enda er rúmlig glasstova, rópt niðri í stovu, við himmalsong, her munnu húsbóndafólkini hava sovið. Hetta er gamla prestakamarið.

Tað hevur fólk búð í Blásastovu inntil 1959. Aftaná fóru húsini mest sum í órøkt. Men í 1969 tóku Arnleyg Jacobsen og maður hennara Tummas stig til at stovna Gøtu Fornminnisfelag við Arnleyg sum formanni. Hon fekk Blásastovu gjørda í stand, eins og hon fekk tryggjað tað gamla umhvørvið, sum var í Norðragøtu. Tískil kunnu vit í dag síggja, hvussu fólk hava búð afturi í 19. øld. Hetta mann vera eitt tað mest áhugaverda mál hjá ferðafólki í Føroyum, og higar koma eisini fólk á gátt úr øllum heiminum.



*Hetta er ein nýggjari mynd av gomlu bygdini í Norðragøtu, sum hava samband við hesa søgu. Fyrst taka vit húsini niðanfyri vegin. Fremst er kirkjan frá 1833, næst eru húsini hjá Peri, í Jákupsstovu, í Mortanstovu og á Brúnni. Beint omanfyri vegin sæst fyrst Glyvr-Hanusarhús, Blásastova, hjá Ísaki, Tjørnustova, beint aftanfyri Mortanstovu, og á Fløtti. Beint omanfyri Glyvr-Hanusar hús eru tey nýggju húsini á Kletti*

## Fólkið í Blásastovu

Út frá fólkateljingum síggja vit, hvør ið hevur búð í Blásastovu frá 1801. Tá er 51 ára gamli Ole Joensen bóndi. Hann gjørdist í hvussu er 95 ára gamal. Kona hansara er Maren Eydensdatter, sum tá var 48 ára gomul.

Tey áttu trý børn. Synirnir vóru Joen f. 1792, sum doyði árið eftir og Eyden f. 1794, sum doyði ógiftur í 1817.

Tá var bert Birgitte, f. 1796, eftir. Hon giftist við Jacob Jacobsen, f. 1794. Hann var úr grannahúsinum í Tjørnustovu. Jákup tók við festinum í 1819.

*Tey fingu sjey børn:*

Maren Sofie, f. 1819, giftist til Gøtugjáar við Hans Eliassen, bónda

Anna f. 1821, doyði lítil.

Anna, f. 1824. Giftist við Poul Petersen, úr Barbustovu í Syðrugøtu.

Ole f. 1826, doyði av tuberklum 19 ára gamal.

Jacob f. 1828, doyði 1879. Meira um hann seinni.

Cathrine f. 1830, doyði ung.

Eiden f. 1832, d. 1890, giftist við Dortheu Andreasdatter.

## Fráhaldsfundur í Blásastovu

Umframt vanliga gerandisdagin og vanlukkur er ikki nóvg, ið kann sigast um gerandisdagin í Norða-gøtu í 19. øld.

Men í 1862 kom ein norðmaður Asbjørn Kloster sjálvur annar til Føroya at prædika fráhald og



*Tórir Thomsen hevur greitt okkum frá húsinum í Blásastovu*